Gallup-kanning:

# Útlendingapolitikkurin kolldømdur

**Útlendingapolitikkur landsstýrisins er ikki fallin í góða jørð hjá føroyingum flestum. Tað vísir ein meiningakanning, sum Gallup hevur gjørt fyri Tarablaðið. Jógvan við Keldu fer ikki at leggja á annan bógv orsakað av hesi kanningini**

ÚTLENDINGA-POLITIKKUR
*Stefan í Skorini*
*stefan@sosialurin.fo*

Landsstýrið hevur ikki fólksins stuðul í førda útlendingapolitikkinum. Tað er niðurstøðan av eini meiningakanning, sum varð kunngjørd í Tarablaðnum í síðstu viku. Gott og væl 500 fólk eru spurd í kanningini.

Spurningurin, sum verður settur í kanningini, ljóðar soleiðis: Hvussu ert tú nøgd/ur við útlendingapolitikk landsstýrisins?

Nærum ein triðingur, 31 %, sigur seg vera sera ónøgdan við tann førda útlendingapolitikkin. 20 % av teimum spurdu siga seg vera ónøgd, og 17 % eru nærri ónøgd.

Sostatt eru 68 % av teimum spurdu ónøgd við útlendingapolitikkin, sum Jógvan við Keldu úr Fólkaflokkinum hevur staðið fyri vegna hesa samgonguna.




*Gallup kanningin vísir eina greiða ónøgd við tann førda útlendingapolitikkin hjá landsstýrinum. Stabbamyndin er tikin úr Tarablaðnum*

Bert 1 % av teimum gott og væl 500 spurdu siga seg vera sera væl nøgd við útlendingapolitikk landsstýrisins. 15 prosent eru nøgd, og 9 prosent eru nærri nøgd.

Landsstýrið hevur tí ein fjórðing av teimum spurdu aftanfyri seg í útlendingapolitikkinum, meðan heili 68 prosent eru ónøgd við politikkin hjá sitandi landsstýri á hesum økinum. Sjey prosent vita ikki, hvat tey skulu halda um útlendingapolitikkin hjá landsstýrinum.

### Størst ónøgd í Tjóðveldisflokkinum

Kanningin vísir eisini, hvussu býtið millum flokkarnar er í hesum spurninginum. 37 prosent av veljarum Fólkafloksins stuðla sínum manni í landsstýrinum.

Mótstøðan er sjálvsagt harðast í størsta andstøðuflokkinum, har 80 prosent geva sína ónøgd til kennar, og bert 22 prosent av sambandsveljarunum taka undir við útlendingapolitikki landsstýrisins.

### Tølini fara at broytast

Jógvan við Keldu, landsstýrismaður við innlendismálum, letur seg ikki taka av fótum av hesi kanningini.

- Eg eri sannførdur um, at hesi tølini fara at broytast sum frálíður, og vit fara ikki at gera nakra serliga broyting í tí førda politikkinum, fyrr enn útgreiningin av útlendingapolitikkinum er liðug, sigur Jógvan við Keldu í viðmerking til kanningina, sum ikki gevur landsstýrinum serliga góð skoðsmál.

Hann skilir hinvegin væl ónøgdina, sum kemur til sjóndar í kanningini, og hann viðgongur eisini, at hann ikki hevur gjørt alt rætt í handfaringini av málinum. Hann trýr hinvegin fult og fast uppá, at fólkið í longdini fer at taka undir við landsstýrinum.

- Eg havi kanska ikki gjørt alt rætt, men fólk fara at taka undir við okkara politikki. Tað at vit hava tikið málið upp á hendan hátt hevur havt við sær nakrar rembingar, men úrslitið verður, at vit fáa ein skipaðan útlendingapolitikk, sum vit ikki hava havt áður, sigur Jógvan við Keldu, sum ikki fer at leggja á annan bógv orsakað av hesi kanningini.

Landsstýrið hevur sett í verk eina útgreining av útlendingapolitikkinum, sum verður liðug í heyst. Útgreiningin verður gjørd av embætismonnum í innlendismálaráðnum saman við einum politiskum fylgibólki við einum umboði fyri hvønn flokk.

Í løtuni umboða íbúgvarnir í Føroyum umleið sjeyti tjóðir umframt tær norðurlendsku tjóðirnar.

# Støðugur vøkstur í ferðafólkatalinum

**Flogvøllurin í Vágunum hevur havt ein vøkstur í ferðafólkatalinum uppá sløk tíggju prosent higartil í ár**

FLOGFERÐSLA
*Stefan í Skorini*

Samlaða ferðafólkatalið higartil í ár hevur verið 108.868 móti 99.087 sama tíðarskeið í fjør. Hetta svarar til ein vøkstur uppá 9,9% higartil í ár. Tað eru fyrst og fremst farleiðirnar til Danmarkar, ið hava havt størsta vøksturin higartil í ár, nevniliga 8,8%.

Í juli mánaða í ár hava tilsamans 27.966 fólk ferðast um floghavnina. Hetta er 7,4% fleiri enn juli í fjør, tá talið var 26.046, ella nærum tað sama sum alt árið 1972. Framgongdin hevur verið á øllum farleiðum uttan til Stórabretlands. Rokmiklasti dagurin higartil í ár var 19. juli, tá 1.552 ferðaðust um floghavnina.

Operatiónirnar, tvs. fráferðir og komur, í juli í ár hava verið 666 móti 551 í juli í fjør. Hetta svarar til 20,9% fleiri operatiónir enn sama tíðarskeið í fjør. Higartil í ár hava operatiónirnar verið 3.281 móti 2.852 í fjør, ella ein øking svarandi til 15,0%. Framgongdin sæst serliga aftur í rutuflúgvingini.



*Flogferðslan um flogvøllin í Vágunum er vaksin við sløkum tíggju prosentum higartil í ár*

Samlaði startmassin, ið er samlaða vektin á flogførunum, er, fyri fyrstu ferð í ár, farin upp um startmassan fyri sama tíðarskeið í fjør. Úr 86.474 tonsum upp í 86.789 tons svarandi til ein vøkstur uppá 0,4%.

Sambært upplýsingum, ið floghavnin hevur fingið frá Atlantsflog er flogposturin 11,4% minni enn í fjør. Annar flogfarmur er higartil í ár 7,0% minni samanborið við í fjør.

## Urgutónleikur í Havnar kirkju

Hóskvøldið 4. august fer organisturin Martin Nipgaard at spæla upp á urguna í Havnar kirkju.

Martin, ið er tónleikalesandi á konservatoriinum í Aarhus, haðani hann tekur kirkjumusikalskt embætisprógv komandi ár, hevur seinastu trý summrini verið vikarur í Vesturkirkjuni og í Havnar kirkju.

Í einar 40 minuttir fáa vit høvi til at lurta eftir tónleiki eftir Buxtehude, Bach, Boéllmann og Chick Corea, ið er jazzmusikari.

Kvøldartónleikurin byrjar kl. 19.30.

## Pisukvøld í Miðlahúsinum í Havn

Sunnudagin 7. august kl. 17:00 skipa Meginfelag Føroyskra Studenta og Altjóða Skrivstovan fyri kunnandi fundi í Miðlahúsinum. Fundurin er ætlaður teimum, ið fara undir hægri lestur uttanlands.

Nógvir eru spurningarnir, ið stinga seg upp, tá ið flytast skal av landinum í lestrarørindum, og fundurin fer at snúgva seg um praktisku, fíggjarligu og sosialu viðurskiftini, ið eru hent at hava greiðu á, áðrenn farið verður undir eitt nýtt lestrarlív. Av hesum kunnu nevnast íbúðar- og skattaviðurskifti, stuðulsskipanir og lestrarbyrjan sum heild.

Umframt umboð fyri MFS og ASK, vera føroysk lesandi frá ymsum donskum býum, Norðurlondum, Stóra Bretlandi og øðrum londum við á fundinum, og høvi verður at seta teimum spurningar um lestrarlívið í ávísa landinum.